# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Eiga herðaklapp uppiborið

Tað er ikki á hvørjum degi, at Føroyar í nógvar dagar á rað eru í altjóða brennideplinum. Leygarkvøldið vóru Føroyar á breddanum, tí fótbóltslandsdystur varð á skránni móti Italia, og mikudagin verða Føroyar aftur á altjóða dagsskránni, tí Skotland fer at vitja.

Veðrið hevur verið gott í nógvar dagar á rað, og veðurmenninir siga seg rokna við, at tað verður gott veður næstu dagarnar. Spell var tað, at veðrið ikki lagaði seg, sum tað varð vónað, tá ið Føroyar og Italia spældu leygarkvøldið. Merkiliga illa hevur tað ofta hepnast við veðrinum, tá ið altjóða dystir hava verið spældir á Tórsvølli.

Útlendskir miðlar eru væl umboðaðir í Føroyum í hesum døgum. Tað merkja vit her á blaðnum. Tað er ikki dagur, at vit ikki hava vitjan. Um vit kunnu hjálpa, so gera vit tað. Hetta lønir seg aftur, tá ið okkara fólk vitja aftur í útlandinum.

Sum tað varð nevnt undan vikuskiftinum, so er tað ikki hissini umrøða og reklama, sum Føroyar fáa í sambandi við landsdystirnar.

Men at umrøðan og útbreiðslan er so stór og víð, sum tað leygardagin kom fram, at hon er, tað vardi okkum ikki. Føroyar verða í hesum døgum vístar fram og umrøddar í Norðuramerika, Suðuramerika, Asia, Australia, Afrika umframt sjálvandi eisini í Europa.

Tað ber neyvan til at gera upp, hvussu nógv peningaliga virðið í hesum er. Einki er at ivast í, at talan er um tvey sifrað tal av milliónum og kanska uppaftur meiri enn tað.

Leygarkvøldið vóru vit eygnavitni til framúr gott føroyskt avrik. Tá ið tað hevur gingið minni væl, hava tað verið mong, sum hava sveiggjað øksina yvir spælarunum, FSF og ikki minst venjaranum. Hugaligt var leygarkvøldið at síggja og hoyra, at útlendskir miðlar róstu føroyska avrikinum. Eitt nú Eurosport, sum ofta hevur verið minni positivt. Viðhvørt við góðum rætti.

Vónandi eru tað eins mong, sum nú geva øllum hesum herðaklapp fyri megnar avrikið, sum varð framt leygarkvøldið móti heimsmeistarunum.

Tað hava allir partar uppiborið. Eisini áskoðararnir, sum tóku so dyggiliga undir við okkara monnum. Góða eydnu móti Skotlandi!

**Sosialurin**

## Stuðul er ósunnur

**ARNI ABRAHAMSEN**



Skrivari Sambandsfloksins, Helgi Abrahamsen, hevur á heimasíðu floksins eitt innlegg, har hann viðgerð tølini, ið Miðflokkurin nýtti í sínari lýsing í einum av bløðunum her fyri.

Nýttu tølini í lýsingini vóru hesi:

Samlaða inntøkan hjá Landskassanum í 2001: uml. 3.800 mio. herav var blokkstuðul 995 mio.

Blokkstuðulin var smá 27% av samlaðu inntøkuni

Samlaða inntøkan hjá Landskassanum í 2005: uml. 4.035 mio. herav var blokkstuðul 631 mio.

Blokkstuðulin var 16% av samlaðu inntøkuni

Ætlaða inntøkan hjá landskassanum fyri 2007: 4.658 mio herav er blokkstuðul 635 mio.

Blokkstuðulin er smá 14% av samlaðu inntøkuni

Táverandi samgonga valdi í 2002 at skerja blokkin, og at lata vera við at prístalsregulera hann, soleiðis at talan bleiv um eina fastfrysting.

Sum tølini omanfyri so tíðiliga vísa, so er blokkurin av tí sama vorðin ein alsamt minni partur av samlaðainntøkugrundarlagnum hjá Landskassanum.

Í grein sínari vísir Helgi á, at um blokkurin var avtikin, so hevði landskassin havt áhaldandi undirskot - sum heldur ikki er nakað loyndarmál.

Men tað sum Helgi als ikki viðgerð, og sum er kjarnin í tí sum verður víst á í hesum tølum, er at vit eru í einari tilgongd, har týdningurin av blokkinum er alsamt minkandi. Her verður als ikki tosað um eina avtøku her og nú, men at vit eru mitt í einari sera áhugaverdari tilgongd.

Sambandsflokkurin vísir á sínari heimasíðu eisini á, at skerjingin hevur higartil kosta okkara samfelag nærum 2 mia. í mistari inntøku. Um man isolera hyggur upp á hetta talið, kann tað tykjast sum eitt øgiligt tal.

Men seta vit hetta talið inn í einari størri heild í tí Føroyska búskapinum, so sær myndin munandi øðrvísi út.

Sum er, mala samfelagshjólini við fullari ferð; orðini "yvirupphiting í búskapinum" hava verið at hoyrt í almenna rúminum. Hvussu hevði støðan verið, um ein peningastreymur á tils. 2 mia. kr. eyka, hevði runnið inn í samfelagið seinastu árini? Og hvat skuldu pengarnir verið nýttir til?

Sannleikin er tann, at vit høvdu ikki fingið stórvegis meir fyri pengarnar enn tað sama, tí vit høvdu verið noydd at rinda meir fyri somu tænastur, tilfar og arbeiðir. So hevði fiskivinnuskúlin í Vestmanna ikki kosta 7 mio. eyka, men kanska 20. Og eyka kostnaðurin fyri miðnámsskúlan í Suðuroy hevði kanska verið tann dupulti av tí hann er í dag osv.

Tað stutta av tí langa er, at við einum øktum almennum peningarensli av hesum formatinum, hevði man ikki fingið stórt meir fyri pengarnar allíkavæl, tí so nógv ferð er á samfelagnum frammanundan. Alt hevði bara verið uppaftur dýrari, enn tað er í dag.

Málið hjá okkum átti at verið, at samfelagið skal rekast við teimum inntøkum og virðum, ið samfelagið sjálvt genererar. Tástandi er javnvág í, og man kann tosa um ein sunnan búskap. Ein peningastreymur inn í ein búskap, ið einans byggir á stuðul, og ikki á virðir, ið eru framleidd og skapt í samfelagnum, er við til at skapa ójavna, og seta eyka (og ónáttúrliga) ferð á samfelagshjólini, og hervið økja um inflatiónina og kostnaðarstøði sum heild.

## Jógvan Martin eitt 13-tal

**FRANK DAVIDSEN**
Sørvágur



Sjáldan, ella rættari ongantíð, áður hava vit sæð eitt so væl skipað landslið við eini so komplettari uppstilling, ið gav okkum áskoðarum eina uppliving av teimum heilt stóru ímóti Italia á Tórsvølli.

Endiliga vísti Christian Høgni okkum síni evni fult út, eins og Andrew spældi ein sera góðan dyst.

Uttan at taka nakað frá Súna, Jón Róa og restini av hópinum, so vóru Rógvi og Mikkjal eftir míni meting teir, ið serliga skaraðu framúr, og ein kann undrast á, at ein leikari sum Mikkjal ikki hevur verið fastur maður á landsliðnum.

Krútsterkur ivð fínum teknikki og dugir væl at teima, tá ið hann taklar, so er hann kanska besti defensivi miðvallarleikarin, vit hava havt á landsliðnum.

At Rógvi fekk níggju út av tíggju bóltum í luftini móti heimsmeistarunum, eins og hann bardist fyri hvønn bólt og harafturat hevur máltev og fekk eitt mál í heimsklassa, sigur alt.

Liðskiparin Óli skal ikki gloymast, og har má sigast, at hann hevur ómetaliga nógv at siga fyri landsliðið, og er tað fult uppiborið, at hóast hann spælir í 1. deild, so er hann krumtappurin á landsliðnum.

Nú landsliðið nærum var fullmannað, vísti Jógvan Martin format, og eftir ein sovorðnan branddyst skylda vit landsliðnum, at vit fylla Svangaskarð mikukvøldið.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.